LM-070/2025

Fylgiskjal 1

ALMANNA- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF SOCIAL AFFAIRS AND CULTURE

Fíggjarmálaráðið
Tinganes
100 Tórshavn

14. oktober 2025
J.nr: 25/25046-3
Tygara skriv:
Viðgjørt: BFS/EHB

Hoyringssvar vegna "Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsins játtanarskipan (Hámark fyri rakstrarútreiðsluvøkstri og løguætlan)"

Fíggjarmálaráðið hevur sent Almanna- og mentamálaráðnum til ummælis uppskot til broyting í løgtingslóg um landsins játtanarskipan.

Almanna- og mentamálaráðið hevur hesar viðmerkingar til lógaruppskotið:

Rakstrarútreiðslur:
Almanna- og mentamálaráðið hevur ikki viðmerkingar til grundarlagið fyri rakstrarframskrivingunum, um talan einans er um at áseta framskrivingarprosentið, sambært grein 7 a í lógaruppskotinum. Men tá talan er um at áseta fíggjarkarmarnar út á hvørja einstaka grein, er tað týdningarmikið at hava í huga, at á summum st. heitum, sum ikki hava framskriving sambært skjali 1. í uppskotinum, hava somu st. heiti undir §12 Almanna- og mentamál framskriving, talan er um st. 51 Tilskot til útlandið og st. 54 Stuðul til annað virksemi.

Løguútreiðslur:
Almanna- og mentamálaráðið ivast í hvat liggur aftanfyri, tá ið skrivað stendur "Tey fyrstu 3 árini eru at rokna sum bindandi og galda verkætlanir, sum kunnu verða liðugt projekteraðar og gjørdar klárar at koyra í útboð."

Tað er týdningarmikið, at tey fyrstu trý árini, ikki einans galda verkætlanir, sum kunnu verða liðugt projekteraðar og gjørdar klárar at koyra í útboð, men eisini fevna um fyrireiking av øðrum verkætlanum.

Sambært grein 7 b, stk. 2 eru tey fyrstu trý árini at rokna sum bindandi. Royndirnar hjá Almanna- og mentamálaráðnum vísa, at tað kann vera trupult at vita, hvør upphæddin verður hetta tíðarskeiðið. Tað kunnu henda broytingar, forskjótingar, prísbroytingar o.a. Harumframt metir Almanna- og mentamálaráðið, at tað er óheppið at upplýsa væntaða prísin alment, áðrenn ein verkætlan er farin í útboð, tí hetta kann ávirka prísin.

Vinaliga

Eyðun Mohr Hansen
aðalstjóri

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
☎ (+298) 30 40 00 • ammr@ammr.fo • www.ammr.fo